# Oddurin skiftur 10 ferð

**Oddastríðið hevur verið óvanliga hart í ár. Heili tíggju ferðir hevur oddasessurin skift eigara, og tíggju ferðir hava ávíkavist B36 og Skála verið ovast**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Tað man vera sjáldan - um nakrantíð - at spenningurin í fótbóltslandskappingini hevur verið somikið stórur, sum hann er tað í ár.

Hóast ÍF tvey av trimum fyrstu umførunum var á odda, so hevur tosið at kalla alt árið snúð seg um tey trý liðini, sum nú mynda oddin. Og fram til seinasta vikuskiftið hevði oddurin skift eigara heilar tíggju ferðir.







### Fimm stig er metið

Tað hevur fleiri ferðir verið tikið til, at tey trý oddaliðini oftani hava fingið ein eyka møguleika. Hetta tí liðini hava skiftst um at snáva. Og líta vit at myndini á hesi síðu, so sæst eisini heilt skjótt, at nakað er um tosið. Tí hóast dystir eru endaði við bæði javnleiki og tapi hjá teimum trimum oddaliðunum, so hevur munurin ongan tíð verið tann heilt stóri.

Størstur var hann í 12. og 13. umfarinum, tá Skála stríddist »heili« fimm stig aftan fyri HB og B36. Tvær ferðir hevur munurin verið fýra stig, og annars hevur so bara tann eini dysturin - ella minni - verið á muni millum nummar eitt og trý. Tríggjar ferðir hevur talan enntá verið um javnstøðu millum tey trý liðini í stigum, og ikki færri enn fimm ferðir hava tvey lið verið ájøvn í stigum.

### Spenningur til tað seinasta

Undan seinasta umfarinum er tað B36, sum er á odda, og tann leiklutin eru teir ikki heilt óvanir við. 10 ferðir hevur árstalsfelagið sitið á oddasessinum í ár, har av trý av umførunum eru tey trý seinastu.

Skála hevur somuleiðis verið tíggju ferðir verið á odda, meðan HB »bara« hevur roynt hendan leiklutin fimm ferðir í ár. Og seinasta ferðin av hesum higartil var, tá teir eftir 17. umfar hildu seg framman fyri grannarnar úr B36 við einum betri málmuni. Men tann veruleikan munnu tey í HB tó leggja lítið í, um tað eydnast liðnum fyri sættu og avgerandi ferðina at leggja seg ovast.

Men tað verða teir í HB ikki einsamallir at gera av. B36 kann við einum sigri halda fast um verandi støðuna í oddinum. Og finna teir báðir grannarnir ikki út av tí heila, so stendur Skála til reiðar at taka av. Sjálvandi treytað av, at teir vinna sín dyst.

Meira spennandi enn tað sama fær tað illa verið, og leygardagin fer størsti parturin av fótbóltsføroyum ivaleyst at halda ondini í samfullar 90 minuttir

### Eisini eldfimt botninum

Skuldi tað hent seg, at spenningurin um oddasessin ikki er tann stóri, tá tað gongur móti seinastu minuttunum, so verður spenningur ivaleyst at finna aðra staðni.

Í botninum er støðan at kalla hin sama. Har er TB í løtuni niðasta liði. Men munurin upp til GÍ er bara eitt stig, og í sínum lag hevur GÍ bara eitt stig upp til VB. Stóran part av árinum hava tað eisini verið hesi, sum hava myndað botnin, og á myndini sæst so eisini, hvussu liðini í botnstríðnum hava roynst í stigasavnanini, sum higartil hevur fevnt um 26 umfør. Men har seinasta orðið enn ikki er sagt.

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur - Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 22.10 | Skála-GÍ | Dagfinn Olsen |
| 22.10 | VB-EB/S | Eiler Rasmussen |
| 22.10 | ÍF-TB | Lassin Isaksen |
| 22.10 | KÍ-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 22.10 | B36-HB | Petur Reinert |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 22.10 | B36-FSV04 | Ransin N. Djurhuus |
| 22.10 | Royn-B71 | Jens P. Brattalíð |
| 22.10 | AB-Sumba | Páll Augustinussen |
| 22.10 | LÍF-HB | Hans F. Hansen |
| 22.10 | B68-GÍ | Milan Cimburovic |

## formuladeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 26 | 14 - 9 - 3 | 36 | 16 | 20 | 51 |
| 2 HB | 26 | 15 - 5 - 6 | 65 | 33 | 32 | 50 |
| 3 Skála | 26 | 13 -10 - 3 | 53 | 28 | 25 | 49 |
| 4 NSÍ | 26 | 13 - 8 - 5 | 52 | 39 | 13 | 47 |
| 5 EB/Streymur | 26 | 11 - 9 - 6 | 47 | 34 | 13 | 42 |
| 6 ÍF | 26 | 6 - 8 - 12 | 32 | 57 | -25 | 26 |
| 7 KÍ | 26 | 7 - 4 - 15 | 35 | 46 | -11 | 25 |
| 8 VB | 26 | 6 - 5 - 15 | 35 | 56 | -21 | 23 |
| 9 GÍ | 26 | 6 - 4 - 16 | 33 | 56 | -23 | 22 |
| 10 TB | 26 | 5 - 6 - 15 | 26 | 49 | -23 | 21 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 17 | 13 - 3 - 1 | 63 | 15 | 48 | 42 |
| 2 B71 | 17 | 13 - 2 - 2 | 66 | 15 | 51 | 41 |
| 3 FSV04 | 17 | 11 - 2 - 4 | 49 | 18 | 31 | 35 |
| 4 AB | 17 | 11 - 2 - 4 | 48 | 32 | 16 | 35 |
| 5 HB | 17 | 7 - 1 - 9 | 40 | 44 | -4 | 22 |
| 6 Sumba | 17 | 6 - 1 - 10 | 33 | 61 | -28 | 19 |
| 7 LÍF | 17 | 5 - 3 - 9 | 45 | 48 | -3 | 18 |
| 8 Royn | 17 | 5 - 2 - 10 | 23 | 52 | -29 | 17 |
| 9 B36 | 17 | 4 - 3 - 10 | 21 | 45 | -24 | 15 |
| 10 GÍ | 17 | 0 - 1 - 16 | 17 | 75 | -58 | 1 |

# Hagtølini siga HB

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skála-GÍ | - | 4-0 | 0-2 | 1-2 | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-2 | 5-4 |
| VB-EB/S | - | 2-1 | 1-1 | 3-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 3-1-0 | 7-2 |
| ÍF-TB | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 1-2 | - | 2-2 | - | 1-1-1 | 4-4 |
| KÍ-NSÍ | 2-3 | 1-0 | 2-2 | 2-3 | 2-1 | 0-1 | 3-0 | 4-1 | 4-0 | - | 2-1 | 6-1-3 | 22-12 |
| B36-HB | 0-0 | 2-5 | 0-2 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 2-1-8 | 9-22 |

HB fær gullið, og spenningurin er, um Skála so megnar at taka silvurið. Samtundis tykist VB skula bjarga sær, meðan ivamálið í botninum stendur millum GÍ og TB.

Soleiðis skuldi gongdin í øllum førum verði, um hagtølini eru eftirfarandi, tá metast skal um seinastu dystirnar í Formula-deildini í ár.

So er spurningurin bara, hvørt hagtølini hava nakað at siga. Stuttlig kunnu tey í øllum førum vera.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava tikist í tilsvarandi dystunum í bestu deildini seinastu 10 árini.

**-mørk**